ítróttur

Nr. 17 • mikudagur • 26. januar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Heðin framvegis ÍSF-forseti

**Forsetin í Ítróttarsambandi Føroya eitur framvegis Heðin Mortensen, hóast fleiri vildu verða við, at hann noyddist at leggja frá sær, tá ið hann gjørdist borgarstjóri í Havnini**

ÍSF-FORSETIN

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Beint sum tað eftir býráðsvalið í november mánað gjørdist greitt, at Heðin Mortensen fór at gerast næsti borgarstjórin í høvuðsstaðnum, bleiv spurningurin reistur, um hann kundi halda fram í forsetasessinum í ÍSF.



*– Vit hava aðalfund í komandi mánað, og tá kundi eg hóskandi fyribils handa einum øðrum persóni ábyrgdina av leiðsluni í ÍSF, meðan eg eri í farloyvi, sigur Heðin Mortensen, sum altso framvegis er virkandi ÍSF-forseti*

## Liggur í innlendismálaráðnum

Fleiri vildu verða við, at kommunustýrislógin ikki loyvdi einum borgarstjóra at hava slíkan álitissess sum forsetasæti í ÍSF, samstundis sum hann var borgarstjóri.

Sjálvur dugir Heðin Mortensen ikki at síggja nakað galið í tí, at hann er ÍSF-forseti, samstundis sum hann eisini er borgarstjóri í Havn.

– Forsetaembætið í ítróttarsambandinum er eitt frítíðarítriv hjá mær, sum eg havi havt í mong ár við síðuna av mínum dagliga yrki. Talan er um eitt ólønt starv, sum ikki ávirkar mítt dagliga starv, og tí dugi eg ikki at síggja nakað galið í tí, at eg siti sum ÍSF-forseti, samstundis sum eg eri borgarstjóri, sigur Heðin Mortensen.

– Fyrr var tað nógv meiri krevjandi at sita í stjórnini í ÍSF, enn tað er nú. Í dag hava vit eina umsiting við skrivstovufólki og ráðgeva, og tað léttir ómetaliga nógv um arbeiðsbyrðuna á stjórnina, sigur ÍSF-forsetin.

Av tí at tað er ógreitt, um tað er nakað, ið forðar fyri, at Heðin Mortensen kann røkja bæði borgarstjórastarvið og forsetaembætið samstundis, eru fólk í innlendismálaráðnum farin undir at kanna málið, og Heðin Mortensen sigur seg vænta eitt svar í næstum.

## Aðalfundur í næstum

Um so er, at innlendismálaráðið kemur til ta niðurstøðu, at Heðin Mortensen ikki kann røkja starvið sum ÍSF-forseti, samstundis sum hann er hægsti maður í høvuðsstaðnum, so fer hann allarhelst í farloyvi úr ÍSF.

– Eg vóni tó, at um so er, so fái eg møguleika til at avvikla tingini ordiligt. Vit hava aðalfund í komandi mánað, og tá kundi eg hóskandi fyribils handa einum øðrum persóni ábyrgdina av leiðsluni í ÍSF, meðan eg eri í farloyvi. Men eg vóni tó, at hetta ikki gerst neyðugt, og at innlendismálaráðið metir, at eg kann røkja báðar sessirnar samstundis. Vit hava jú fleiri dømi um politikkarar, sum sita bæði sum løgtingslimir og borgarstjórar í sínari heimkommunu, og eg dugi ikki at síggja, at tað er nakað frægari enn mín støða, sigur Heðin Mortensen.

Tá ið ÍSF hevur aðalfund í komandi mánað, stendur Heðin Mortensen sjálvur ikki fyri vali. Hann hevur eitt ár eftir av sínum valskeiði, men hinir báðir stjórnarlimirnir í ítróttarsambandinum, Sverri Midjord og Petur Elias Petersen, standa báðir fyri vali á komandi aðalfundi.

# Sær gott út hjá Neistanum

**Neistin tykist hava annað beinið í steypafinaluni undan seinnu hálvfinaluni móti Søljuni á Hálsi í kvøld**

NEISTIN-SØLJAN

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tann fyrra hálvfinalan millum liðini bæði var leikt á Giljanesi fyri júst tveimum vikum síðani, og tað var ein heldur løgin dystur. Í tí dystinum sá tað nevnliga leingi út til, at Søljan fór at vinna ein tryggan sigur, tí tær vóru eitt skifti á odda við sjey málum. Men Neistakvinnurnar fótaðu sær, og tær megnaðu at vinna við sjey málum, tá ið alt kom til stykkis.

## Ræður um at steðga Nicoletu

Tað er eingin loyna, at hjá Søljuni stendur og fellur tað mesta við Nicoletu Radu Hansen, ið hvørt einasta vikuskifti er toppskjútti hjá vágakvinnum. Um mótstøðuliðini megna at steðga henni í einum dysti, so er nógv vunnið, tí tá er lítið um Søljuna.

Onkur vil kanska verða við, at tað sama er galdandi við Neistanum og Simonu Petersen, men tað kann ikki heilt samanberast, tí breiddin á neistaliðnum er væl betur enn hjá Søljuni. Havnarliðið hevur fleiri aðrar javnt góðar leikarar, ið kunnu fáa álopsspælið at koyra, uttan at Simona er ein partur av tí.

Júst breiddin kann tykjast verða munurin á hesum báðum liðunum. Hjá Søljuni eru tað umframt Nicoletu leikarar sum Lina Andriulyte og Heidi Maria Akselsen, ið draga tað tunga lessið saman við Kristinu í málinum.

Hinvegin hevur Neistin eitt sindur fleiri leikarar, ið kunnu avrika nakað einsamallar. Her verður hugsað um eitt nú Simonu Petersen, Ásu á Neystabø, Marjun Tróndarson, Annika Thomsen, Lív Sørensen og aðrar við.

At Neistin eisini megnaði at venda einum hóttandi stórtapi til ein greiðan sigur, er óivað við til at geva teimum bláu úr Havn eitt sindur eyka sjálvsálit undan dystinum á Hálsi í kvøld.

Óansæð um tað verður Neistin ella Søljan, sum vinnur sær sess í finaluni, so noyðist viðkomandi lið at finna seg í at verða "the underdogs", tá ið finalan verður leikt, tí vinnandi liðið av hinari hálvfinaluni millum Stjørnuna og VB verður stórfavorittur.



*Eftir trygga sigurin í fyrru hálvfinaluni, eru kvinnurnar hjá Neistanum nú heilt nær fyrsta finaludystinum í sjey ár*